

Atlantsmótið livir framvegis, og tað sera væl. Stórar útbyggingar og fund eystan fyri føroyska markið eru eisini við til at halda lív í føroysku oljuleitingini. Grønu og reyðu økini eystan fyri markið eru stór olju- og gassfund. Kort

# Framvegis ein spennandi oljuframtíð á Atlantsmótinum

Deil:

**Jan Müller**

01.02.2015 - 15:21

Oljan.fo

Analysa við Jan Müller

Tað er ikki eiti á mótstreymi, sum altjóða oljuvinnan er komin í seinastu mánaðirnar, nú oljuprísurin er farin nærum niður í helvt. Henda príslækkingin tykist hava tikið øll á bóli. Um somu tíð, sum hon hóttir serstakliga fleiri av teimum smærri og meðalstóru

oljufeløgunum og eisini avmarkar framtíðar leiting og útbyggingar, kemur hon sera væl við hjá samfeløgum, fyritøkum og einstakligum, sum brúka olju og gass.

Og hesa gongdina síggja vit eisini aftur heima hjá okkum sjálvum, har ikki minst fiskvinnan og húsarhaldini njóta gott av lækkingini. Men hjá teimum, sum arbeiða við at leita eftir og finna olju og gass í føroysku undirgrundini, er søgan ein onnur. Her kemur príslækkingin, sum steinur oman á byrðu, í kjalarvørrinum á tveimum turrum brunnum á landgrunninum í fjør.

3 oljufeløg eftir

Oljufeløg hava so eisini longu latið inn aftur fleiri av loyvunum. Nøkur teirra eru rýmd, meðan onnur standa til at fara. Av teimum 15-20 feløgunum, sum vórðu við í leitingini frá fyrstan tíð fyri skjótt 15 árum síðani, eru nú bert 3 eftir. Og hvussu langa tíð aftrat hesi feløg fara at vera í Føroyum, veit enn eingin við vissu. Men vil heilt illa til, so er tann dagur, har einki oljufelag er eftir í Føroyum, kanska ikki so fjarur, tó at vit enn liva í vónini um, at so fer ikki at vera. Vit ynskja, at verandi feløg verða verandi, og at onnur nýggj koma til. Men hvussu realistiskt tað er, er so ein annar spurningur.

Vit kunnu í hvussu er staðfesta, at lækkaði oljuprísurin ger tað ikki serliga hugaligt hjá oljufeløgunum at halda fram við at gera stórar íløgur í einum øki, har tað er kostnaðarmikið at leita eftir olju og gassi, og har óvissan um at finna nakað í bræði – tí so lítið er borað - eisini er stór.

Tað er tí eingin løtt og einføld uppgáva hjá myndugleikunum at halda leitingini gangandi, tó at neyvan nakrantíð er meira neyðugt enn nú at leggja allar árar út, hugsa nýggjar og øðrvísi tankar og skapa fortreytir fyri, at altjóða oljuvinnan framhaldandi vil vera við í roydunum at finna føroysku oljuna.

Størsta oljukelda í Europa nær Føroyum

Tí tað vita vit longu við vissu, at í grannalagnum, stutt frá okkara marki, finnast nakrar av teimum stóru oljukeldunum í heiminum. Ein teirra, Clair, er størsta oljukeldan í Europa við sínum umleið 8 mia. tunnum av olju. Og nærhendis hesa og enn tættari føroyska landgrunninum finnast nakrar av teimum størstu framleiðandi keldunum í bretskum øki, nevniliga Schiehallion og Foinaven. Og tætt upp at hesum og enn nærri markinum, liggja so uppaftur stórar oljukeldur, sum standa fyri at verða útbygdar. Og loksins kunnu vit so staðfesta, at um ikki so langa tíð, verður fyrsta gasskeldan vestan fyri Hetland ella um tú vil, eystan fyri Føroyar, “Laggan Tormore” tikin í nýtslu.

Allar hesar sannroyndir tala fyri, at leitingin við Føroyar eigur at halda fram, tí tað kann ikki bera til, eins og framstandandi oljufólk fleiri ferðir hava sagt, at tá olja og gass finst nærum allan vegin framvið markinum á bretskum øki, so má tað eisini finnast hinumegin markið, tvs. á føroyska landgrunninum. Og tað er eisini avgjørda hugsanin hjá okkara egnu jarðfrøðingum, at kolvetni finnast her. Spurningurin er “bara” um finna røttu støðini at seta borin í. Og tað er eingin løtt og bílig uppgáva. Men úrslitini í grannalagnum halda so kortini vónunum á lívi.

Og hyggja vit so eftir ungu oljusøguni á Atlantsmótinum, sum jú fevnir um økið frá Hetlandi til Føroya, so eru oljufeløgini, eftir at tey funnu olju í Norðsjónum, farin longur og longur vestur í hav fyri at finna kolvetni, og har tað er borað nóg nógv og leingi, har hevur tað eisini givið úrslit. Hóast tær ikki eru so nógvar í tali, oljukeldurnar vestan fyri Hetland, so eru tær stórar og lønandi. Og nú standa fleiri teirra til at verða bygdar út, eins og hol verður sett á nýggjar keldur, her Rosebank, Cambo, Tornado og Solan fyri bert at nevna nakrar teirra.

Fund við Hetland týdning fyri Føroyar

Hyggja vit aftur í søgunnar bakspegl, síggja vit, at tað júst eru fundini hinumegin markið, sum hava skundað undir og skapt áhuga fyri føroysku leitingini. Og so leingi olja og gass verður framleitt og funnið stutt frá føroyska markinum, soleingi fer eisini áhugin fyri føroysku oljuni at vera til steðar. Tað vil tí eisini vera rætt av føroyskum myndugleikum at umhugsa eina nýggja útbjóðing við Føroyar, tó at henda má leggjast væl til rættis og "timast" væl. Men aftrat hesum eigur konstruktivt hugflog og innovatión eisini at vera partur av royndunum at tryggja, at ikki øll verandi feløg, tó at hesi eru fá í tali, ikki rýma heilt.

Ì øllum myrkurinum í sambandi við oljuprísirnar síggjast eisini glottar um okkara leiðir. Shell, eitt av heimsins størstu oljufeløgum, boðaði nú um dagarnar frá, at tað fer at skerja sínar íløgur í leiting og útbyggingar kring heimin eitt nú í Norðsjónum. Hetta fer kortini ikki at raka tær íløgur, sum í løtuni verða gjørdar í stóru oljufeltini eystan fyri føroyska markið, Schiehallion og Clair. Her eru eisini onnur av heimsins størstu oljufeløgum virkin, nevniliga BP, ConocoPhilips, Chevron og Total.

Føroyskt "íkast"

Hóast henda støða ikki nýtist at hava nakra beinleiðis ávirkan á Føroyaøkið, er tað tó ein sannroynd, at føroyski landgrunnurin er í teirra bakgarði, um ein kann siga so. Risastórar íløgur í eitt nú infrastruktur kunnu í framtíðini gerast meira lønandi, um olja og gass eisini verða funnin í grannalagnum, nevniliga á føroyska landgrunninum. Vit eiga tí ikki at undirmeta júst hetta senario, har fund á føroyskum kunnu gerast lønandi við at knýta tey í verandi infrastruktur hinumegin markið – og har oljuvinnan har aftur fyri kann blíva uppaftur meira lønandi vegna føroyska "íkastið".

Hóast 9 úrslitaleysir brunnar eru boraðir við Føroyar, so skulu vit harfyri ikki missa vónina til eitt føroyskt oljuævintýr, tí feløg sum DONG og OMV, sum eru sera virkin um okkara leiðir og framhaldandi eru partur av føroysku leitingini, halda seg til eina strategi, sum sær alt økið frá Hetlandi til Føroya, eisini nevnt Atlantsmótið, sum eina og somu oljuprovins. Tað skuldi givið okkum vónir um, at hesi feløgini fara ikki uttan víðari at rýma úr Føroyum. Og her er ein framhaldandi og góður dialogur millum okkara myndugleikar og feløgini av alstórum týdningi.

Til ber sjálvandi at gera sær nógvar ymsar tankar og hugleiðingar kring oljuframtíðina á Atlantsmótinum. Eitt skerst so ikki burtur, og tað er, at tað bert eru fáir kilometrar frá ríku olju- og gassleiðunum á bretskum øki til føroyska landgrunnin.

Og hvør veit um ikki eisini teir politisku myndugleikarnir í Føroyum og Bretlandi gera sær sínar metingar um støðuna uppá longri sikt og síggja møguleikar fyri longu nú at leggja lunnar undir einum framtíðar orkusamstarvi, sum bæði fevnir um olju og gass og aðrar orkumøguleikar.

Milliardailøgur við markið

Tær hundraðtals milliardirnar, sum í løtuni, hóast lágar oljuprísir, verða lagdar í útbyggingar og leiting tætt upp at føroyska markinum, kunnu vera tann “gamechanger”, ið skal til fyri at fáa oljufeløg at fara eitt stig víðari og brúka neyðugu orkuna at finna oljuna og gassið undir føroyska basaltinum eisini.

Spennandi verður at fylgja við og síggja, hvørji stig okkara myndugleikar fara at taka komandi tíðina fyri at skapa framhaldandi og nýggjan áhuga fyri føroysku undirgrundini. Eitt er í hvussu er vist, og tað er, at olja og gass finst eisini føroysku megin miðlinjumarkið millum Føroyar og Bretland. Tað er longu prógvað. Nú ræður “bara” um at finna lønandi goymslur. Og her áliggur ein stór uppgáva hjá okkara myndugleikum at skapa fortreytirnar og harvið eisini áhugan. Hvat oljufeløgini vilja er ikki minni týdningarmikið.

Deil:

**Jan Müller**

01.02.2015 - 15:21

Oljan >

Analysa við Jan Müller

Tað er ikki eiti á mótstreymi, sum altjóða oljuvinnan er komin í seinastu mánaðirnar, nú oljuprísurin er farin nærum niður í helvt. Henda príslækkingin tykist hava tikið øll á bóli. Um somu tíð, sum hon hóttir serstakliga fleiri av teimum smærri og meðalstóru oljufeløgunum og eisini avmarkar framtíðar leiting og útbyggingar, kemur hon sera væl við hjá samfeløgum, fyritøkum og einstakligum, sum brúka olju og gass.

Og hesa gongdina síggja vit eisini aftur heima hjá okkum sjálvum, har ikki minst fiskvinnan og húsarhaldini njóta gott av lækkingini. Men hjá teimum, sum arbeiða við at leita eftir

og finna olju og gass í føroysku undirgrundini, er søgan ein onnur. Her kemur príslækkingin, sum steinur oman á byrðu, í kjalarvørrinum á tveimum turrum brunnum á landgrunninum í fjør.

3 oljufeløg eftir

Oljufeløg hava so eisini longu latið inn aftur fleiri av loyvunum. Nøkur teirra eru rýmd, meðan onnur standa til at fara. Av teimum 15-20 feløgunum, sum vórðu við í leitingini frá fyrstan tíð fyri skjótt 15 árum síðani, eru nú bert 3 eftir. Og hvussu langa tíð aftrat hesi feløg fara at vera í Føroyum, veit enn eingin við vissu. Men vil heilt illa til, so er tann dagur, har einki oljufelag er eftir í Føroyum, kanska ikki so fjarur, tó at vit enn liva í vónini um, at so fer ikki at vera. Vit ynskja, at verandi feløg verða verandi, og at onnur nýggj koma til. Men hvussu realistiskt tað er, er so ein annar spurningur.

Vit kunnu í hvussu er staðfesta, at lækkaði oljuprísurin ger tað ikki serliga hugaligt hjá oljufeløgunum at halda fram við at gera stórar íløgur í einum øki, har tað er kostnaðarmikið at leita eftir olju og gassi, og har óvissan um at finna nakað í bræði – tí so lítið er borað - eisini er stór.

Tað er tí eingin løtt og einføld uppgáva hjá myndugleikunum at halda leitingini gangandi, tó at neyvan nakrantíð er meira neyðugt enn nú at leggja allar árar út, hugsa nýggjar og øðrvísi tankar og skapa fortreytir fyri, at altjóða oljuvinnan framhaldandi vil vera við í roydunum at finna føroysku oljuna.

Størsta oljukelda í Europa nær Føroyum

Tí tað vita vit longu við vissu, at í grannalagnum, stutt frá okkara marki, finnast nakrar av teimum stóru oljukeldunum í heiminum. Ein teirra, Clair, er størsta oljukeldan í Europa við sínum umleið 8 mia. tunnum av olju. Og nærhendis hesa og enn tættari føroyska landgrunninum finnast nakrar av teimum størstu framleiðandi keldunum í bretskum øki, nevniliga Schiehallion og Foinaven. Og tætt upp at hesum og enn nærri markinum, liggja so uppaftur stórar oljukeldur, sum standa fyri at verða útbygdar. Og loksins kunnu vit so staðfesta, at um ikki so langa tíð, verður fyrsta gasskeldan vestan fyri Hetland ella um tú vil, eystan fyri Føroyar, “Laggan Tormore” tikin í nýtslu.

Allar hesar sannroyndir tala fyri, at leitingin við Føroyar eigur at halda fram, tí tað kann ikki bera til, eins og framstandandi oljufólk fleiri ferðir hava sagt, at tá olja og gass finst nærum allan vegin framvið markinum á bretskum øki, so má tað eisini finnast hinumegin markið, tvs. á føroyska landgrunninum. Og tað er eisini avgjørda hugsanin hjá okkara egnu jarðfrøðingum, at kolvetni finnast her. Spurningurin er “bara” um finna røttu støðini at seta borin í. Og tað er eingin løtt og bílig uppgáva. Men úrslitini í grannalagnum halda so kortini vónunum á lívi.

Og hyggja vit so eftir ungu oljusøguni á Atlantsmótinum, sum jú fevnir um økið frá Hetlandi til Føroya, so eru oljufeløgini, eftir at tey funnu olju í Norðsjónum, farin longur og longur vestur í hav fyri at finna kolvetni, og har tað er borað nóg nógv og leingi, har hevur tað eisini givið úrslit. Hóast tær ikki eru so nógvar í tali, oljukeldurnar vestan fyri

Hetland, so eru tær stórar og lønandi. Og nú standa fleiri teirra til at verða bygdar út, eins og hol verður sett á nýggjar keldur, her Rosebank, Cambo, Tornado og Solan fyri bert at nevna nakrar teirra.

Fund við Hetland týdning fyri Føroyar

Hyggja vit aftur í søgunnar bakspegl, síggja vit, at tað júst eru fundini hinumegin markið, sum hava skundað undir og skapt áhuga fyri føroysku leitingini. Og so leingi olja og gass verður framleitt og funnið stutt frá føroyska markinum, soleingi fer eisini áhugin fyri føroysku oljuni at vera til steðar. Tað vil tí eisini vera rætt av føroyskum myndugleikum at umhugsa eina nýggja útbjóðing við Føroyar, tó at henda má leggjast væl til rættis og "timast" væl. Men aftrat hesum eigur konstruktivt hugflog og innovatión eisini at vera partur av royndunum at tryggja, at ikki øll verandi feløg, tó at hesi eru fá í tali, ikki rýma heilt.

Ì øllum myrkurinum í sambandi við oljuprísirnar síggjast eisini glottar um okkara leiðir. Shell, eitt av heimsins størstu oljufeløgum, boðaði nú um dagarnar frá, at tað fer at skerja sínar íløgur í leiting og útbyggingar kring heimin eitt nú í Norðsjónum. Hetta fer kortini ikki at raka tær íløgur, sum í løtuni verða gjørdar í stóru oljufeltini eystan fyri føroyska markið, Schiehallion og Clair. Her eru eisini onnur av heimsins størstu oljufeløgum virkin, nevniliga BP, ConocoPhilips, Chevron og Total.

Føroyskt "íkast"

Hóast henda støða ikki nýtist at hava nakra beinleiðis ávirkan á Føroyaøkið, er tað tó ein sannroynd, at føroyski landgrunnurin er í teirra bakgarði, um ein kann siga so. Risastórar íløgur í eitt nú infrastruktur kunnu í framtíðini gerast meira lønandi, um olja og gass eisini verða funnin í grannalagnum, nevniliga á føroyska landgrunninum. Vit eiga tí ikki at undirmeta júst hetta senario, har fund á føroyskum kunnu gerast lønandi við at knýta tey í verandi infrastruktur hinumegin markið – og har oljuvinnan har aftur fyri kann blíva uppaftur meira lønandi vegna føroyska "íkastið".

Hóast 9 úrslitaleysir brunnar eru boraðir við Føroyar, so skulu vit harfyri ikki missa vónina til eitt føroyskt oljuævintýr, tí feløg sum DONG og OMV, sum eru sera virkin um okkara leiðir og framhaldandi eru partur av føroysku leitingini, halda seg til eina strategi, sum sær alt økið frá Hetlandi til Føroya, eisini nevnt Atlantsmótið, sum eina og somu oljuprovins. Tað skuldi givið okkum vónir um, at hesi feløgini fara ikki uttan víðari at rýma úr Føroyum. Og her er ein framhaldandi og góður dialogur millum okkara myndugleikar og feløgini av alstórum týdningi.

Til ber sjálvandi at gera sær nógvar ymsar tankar og hugleiðingar kring oljuframtíðina á Atlantsmótinum. Eitt skerst so ikki burtur, og tað er, at tað bert eru fáir kilometrar frá ríku olju- og gassleiðunum á bretskum øki til føroyska landgrunnin.

Og hvør veit um ikki eisini teir politisku myndugleikarnir í Føroyum og Bretlandi gera sær sínar metingar um støðuna uppá longri sikt og síggja møguleikar fyri longu nú at leggja

lunnar undir einum framtíðar orkusamstarvi, sum bæði fevnir um olju og gass og aðrar orkumøguleikar.

Milliardailøgur við markið

Tær hundraðtals milliardirnar, sum í løtuni, hóast lágar oljuprísir, verða lagdar í útbyggingar og leiting tætt upp at føroyska markinum, kunnu vera tann “gamechanger”, ið skal til fyri at fáa oljufeløg at fara eitt stig víðari og brúka neyðugu orkuna at finna oljuna og gassið undir føroyska basaltinum eisini.

Spennandi verður at fylgja við og síggja, hvørji stig okkara myndugleikar fara at taka komandi tíðina fyri at skapa framhaldandi og nýggjan áhuga fyri føroysku undirgrundini. Eitt er í hvussu er vist, og tað er, at olja og gass finst eisini føroysku megin miðlinjumarkið millum Føroyar og Bretland. Tað er longu prógvað. Nú ræður “bara” um at finna lønandi goymslur. Og her áliggur ein stór uppgáva hjá okkara myndugleikum at skapa fortreytirnar og harvið eisini áhugan. Hvat oljufeløgini vilja er ikki minni týdningarmikið.